# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Elin Mariu Olsen / Anita Samuelsen:

## Kundu hugsað sær at arbeitt við fjølmiðlum

STARVSVENJING

Fríggjadagin 3. november var seinasti dagur í starvsvenjingini hjá Elin Mariu Olsen í Streymnesi og Anitu Samuelsen úr Haldarsvík á Sosialinum.

Elin Maria og Anita ganga báðar í sama flokki á Felagsskúlanum á Oyrarbakka.

Anita var fyrst eina viku hjá Per á Hædd, myndamanni, og síðan eina viku á Sosialinum, meðan Elin Maria var báðar vikurnar á Sosialinum.

Tær siga báðar, at hetta vóru tvær spennandi og lærutíkar vikur. Tær kendu seg sera vælkomnar, og starvsfólkini vóru blíð og fyrikomandi.

Um framtíðina siga báðar, at tær kundu hugsað sær at arbeitt við fjølmiðlum.



*Fríggjadagin var seinasti dagur í starvsvenjingini hjá Elin Mariu Olsen og Anitu Samuelsen á Sosialinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Nielsen, Klaksvík**, andaðist sunnudagin 5. november á Norðoya Røktarheimi, 86 ára gomul. Jarðarferðin verður kungjørd seinni.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum við vitjan, gávum, blómum, uppringingum, telegrammum og kortum gleddu meg á 80 ára føðingardegnum 12. oktober 2006 takki eg hjartaliga. Ein serstøk tøkk til dóttrina.

**Heilsan**
**Absalon Jacobsen, Vágur**

## FÆRØ E XPO 2006 letur upp leygardagin




**Leygardagin 11. november letur framsýningin Færø Expo 2006 upp í Bredgade Kunsthandel í København við átta føroyskum listafólkum. Framsýningin verður opin til fríggjadagin 1. desember**

LISTAFRAMSÝNING

Annaðhvørt ár skipar Bredgade Kunsthandel i Keypmannahavn fyri Færø Expo tiltakinum við tí endamáli sýna fram føroysk listaverk.

Hesaferð eru tað listafólkini Kári Svensson, Eyðun av Reyni, Amariel Norðoy, Torbjørn Olsen, Zacharias Heinesen og Beinta av Reyni sum sýna fram.

Framsýningin letur upp leygardagin 11. nov. kl. 13, tá føroyski umboðsmaðurin í Keypmannahavn, Herálvur Joensen, setur Færø Expo 2006. Eisini luttekur tónleikbólkurin Aldubáran.

Adressan er: Bredgade Kunsthandel, Bredgade 69, DK-1260 København K.

Framsýningin er opin til fríggjadagin 1. des., týsdag til fríggjadag frá 13 – 18 og leygardag 11 – 15.

Frá 3.- 23 des. verður framsýningin í "Galleri Boxen", Norgesvej 11, Horsens.

**Dagurin í morgin**
**7. november. Engelbrekt.** Deyður í 1225. Týskur munkur, sum longu 30 ára gamal gjørdist erkabiskupur í Köln. Sum kirkjupolitikari tók hann sær fyri at bøta um mong viðurskifti, sum vóru farin av lagi. Hann fekk, sum vera man, nógvar fíggindar, sum gingu saman í ráð og myrdu hann.

Navnið er týskt, samansett av orðunum anglar (fólkaslagnum) og bjartur.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

MÓTTØKA

Í SAMBANDI VIÐ AT FUGLAFJARÐAR KOMMUNA HEVUR SETT SOSIALU DEILD Á STOVN, BJÓÐA VIT TIL ALMENNA MÓTTØKU Í HØLUM STOVNSINS.

KARVATOFTIR 4B Í FUGLAFIRÐI

FRÍGGJADAGIN TANN 10. NOVEMBER 2006

FRÁ KL. 14.00 – 17.00